# føroysk mentan er




*Dansarin Kristina Ougard Sørensen hevði tveir stuttar dansir eftir tónleiki hjá Dánjali á Neystabø, ein melankolsk og ævintýrkend koreografi, skrivar Gunnvá Zachariassen í hesum ummæli av føðingardagshaldinum í Norðurlandahúsinum, har hon eisini vísir á, at bert ein pall-list glimraði við sínari fráveru – sjónleikurin*

leiddu gallashowi við skemti og professionalismu. Genialt við gitikappingini hjá Jensinu, tað ér nærum so, at tað er vorðið pensum í skúlanum at vita, hvaðani glasið í Norðurlandahúsinum kemur, stálið, grasið, træið, grótið. Partur av almenna dannilsinum í Føroyum um mann so má siga og lukkutíð hevði Sjúrður lisið upp á lektiuna, svaraði rætt hvørja ferð, eisini tá Jensina spyr klassiska kvinnuspurningin: Sært tú nakað, sum er broytt við mær? Rætt svar: Tú hevur fingið nýggja frisuru, tú ert í nýggjum kjóla og ert tú ikki klænkað?

## Showcase?

Skráin boðaði frá nógvum spennandi innsløgum og nøvnum, tað, sum veruliga er hot í Føroyum í løtuni innan tónleik og sniðgeving. Hesar tvær listir eiga opinbart bróðurpartin í eini jubileumsveitslu hjá størstu mentanarháborg føroyinga anno 2008. Men okkurt í mær fekk meg at hugsa, at hetta líkist aftur nú eini showcase, sum skal branda føroyska sniðgeving og tónleik úteftir. Við allari virðing og djúpari eyðmýkd fyri hesum listum.

## Ein syngjandi Gandalf

Eg komi ikki inn á hvørt einstakt innslag (sí ummæli aðrastaðni í blaðnum), tó var eg heilt eksað í øllum kroppinum frá tí løtu Hanus G. Johansen trein innar á pallin við sínum dragandi trøllamátti, ein kraft úr úrdýpinum, sum gjørdi, at hárini reistust, so hugtakandi er Hanusar pallnærvera.

Tá vóru vit eisini væl upphitað av kantatuni "Jørð", sum er skapað til 25 ára hátíðarhaldið, orð eftir Róa Paturssyni, tónasmíð eftir Kára Bæk, frumframførd av Aldubáruni og kórinum Tarira, stjørnað av Bernarði Wilkinsson. Eitt rugvusmikið og komplekst verk, sum undirritaða er alt ov eyðmjúk og ókvalifiserað til at leggja seg út í at ummæla. Tó vildi eg ynskt, at um yrkingin absolut skal lesast upp, at tað varð gjørt av professionellum sjónleikara, so orðini fáa flog út í salin og hugløg og myndir kunnu skapast í huganum á áhoyrarunum.

## Nostalgiskt afturlit

Ein filmpotpourri av brotum frá søgu Norðurlandahúsins hesi 25 árini rakti eisini eitt stað í solar plexus, tá vit eitt nú síggja William Heinesen, sála fara til upplatingina av húsinum í 1983. Øll hesi listaverk, allar hesar framførslur, øll hesi fólk, sum hava staðið á pallinum hesi 25 árini og oyst av tí keldu, sum føroysk mentan er: Jesus og Makedonarin, Eitt Dukkuheim, barnadansur, Føroyakórið, Antigone, Føroya Symfoniorkestur, fimleikafagnaður, gestaleikir úr Kongaliga Teatrinum og Cullberg Ballettini, opera, konsertir av alskyns slag, ein yngri Hanus Johansen, ein yngri Annika Hoydal, ein yngri Rói Patursson, sangleikir, Skeyk, Oceanic Days, Prix Føroyar, Listastevnan, Glataðu Spælimenninir, framsýningar, dansir, vitjanir, listafólk, sum liva og listafólk, sum eru farin. Upplivilsir, sum hava sett seg í minnið hjá okkum øllum. Ikki sørt at lítil nostalgiskur klumbur settist í hálsin. Eitt nú at síggja Sverra Egholm, sála sum kong Kreon í uppsetingini av Antigone frá 1989.

## Ævintýr, nymfur, frummegi og klovnar

Dansarin Kristina Ougaard Sørensen hevði tveir stuttar dansir eftir tónleiki hjá Dánjali á Neystabø, ein melankolsk og ævintýrakend koreografi. Gleði meg at síggja fleiri modernaðir dansir frá teimum mongu útbúnu dansarum, vit eftirhondini eiga. Vónandi aftrast tey ikki, hóast soltin og pírin stuðulsviðurskifti her á landi.

Koreografiin var eisini tað, sum eg beit merki í í framsýningini av sniðgevunum Guðrum & Guðrun, Johonnu av Steinum og Barbaru í Gongini. Feitt, hetta skapar eina so heilt einastandi atmosferu rundan um klæðini, eitt heildarupplivilsi, sum geva sniðgevingini eina størri dimensjón, tá tey fortelja søgur við tónleiki og rørslunum. Vit vóru langt frammi í framtíðini í einum mekaniskum Barbie-landi, Blade Runner nymfum, undir havi, á fabrik, í áartutli, úti í regnskóginum.... hugurin slapp at ferðast víða saman við hesum sansaligu búnum.

Ein væluppløgd Eivør, sum við einum ikki minni væluppløgdum orkestri, oysti av síni keldu av gandamegi. Har var sanniliga samband við frummáttin, nakað sum eg haldi ikki altíð eyðnast hjá Eivør at hava við, men nú var tað har í 7000volt. Tað sama við BUDAM sum við einum spæli- og lívskátum orkestri fortaldi okkum , at vit eru øll klovnar. UG!! Og eg gleði meg til næstu konsert.

## Og tó...

Samanumtikið ein praktfull og festlig føðingardagsframførsla, sum bara vaks og vaks, sum kvøldið leið.

MEN ein pall-list glimraði við síni fráveru. Hvar var sjónleikurin í hesum hátíðarhaldi?

Er tað kanska ein endurspegling av tí status, sum sjónleikur hevur í løtuni í almenna rúminum? Sum eitt heimleyst leysingarbarn, ongin torir at vísa fram? Rættuliga ørkymlandi og atfinnandi. (ok. nú ér undirritaða sindur innarliga í hesi listagrein, tí eri eg so snerkin, men kortini...). Tað mundi ikki tikið frá nøkrum til dømis at víst eitt lítið live brot úr onkrum av teim óteljandi sjónleikaframleiðslunum, sum hava verið á palli í Konsertsalinum: Eitt Dukkuheim, Frk. Julie, Hvør ræðist Virginu Wolf?, Antigone, Glataðu Spælimenninar, Dreymur Jóansøkunátt, Húsið hjá Bernarda Albu, Olivur Twist, Royndin, Í Óðamannagarði bert fyri at nevna nakrar úr rúgvuni. Ella úr teimum mongu publikums-trekkjandi sangleikunum hjá Studentaskúlanum í Hoydølum kundi man eisini hiva eitt nummar fram í dagens anledning. Ella leita í onkrum skuffum eftir nýskrivaðum dramatikki, um tað er frameftir vit skulu líta. Eg skilji ikki hesa raðfesting og góðtaki hana heldur ikki.

## Listafólk ganga á odda

Men eg vóni, at vit øll í framtíðini sleppa at oysa úr tí keldu, sum er føroysk mentan og list. So vit fáa eitt uppaftur fjølbroyttari, ríkari, tolsamari, villari, spírandi, fríari og ótæmdari mentanarlívi.

Sum Kristina Háfoss, landsstýriskvinna í mentamálum segði: "So vit kunnu verða fyrimyndir fyri børnum og ungum og at vit fáa møguleika at skapa og uppliva nakað serstakt, sum setir Føroyar á heimskortið". Gott Kristina! Og gávan frá Mentamálaráðnum við teimum gávuríku kvæðakempunum úr Sankta Frants skúla var so sanniliga upp á pláss, var hvørki bleyt ella hørð, men bæði í einum.

Júst sum Norðurlandahúsið sjálvt.